hvonn LIVE

# TALENT



KLUMMA
*Steintór Rasmussen*

Talent ella ikki. Tað er spurningurin og sjálvur trupulleikin.

Dómskirkjan í Kirkjubø varð ongantíð liðugt bygd, men tey, sum komu aftaná, og sum síðani hava búleikast á oyggjunum, hava nýtt nógva orku at laga garðar rundanum egið veldið.

Allastaðni í samfelagnum renna vit okkum ímóti hesum múrum, har mætir riddarar og stirvnar skipanir verja borg kongsins. Støðan í landinum er tann sama og vanliga fólkið skilur lítið, hvat vísmenn og høgir ráðharrar gera á slottinum.

Vit látast at vera mentað og framkomin vinnutjóð, og á hátíðarligari samkomu skýra vit Ársins Leiðara, har týdningarmiklir menn og kvinnur eru í sínum rætta essi. Men í spottunum standa eisini kongar og drottningar, sum uttan størri samfelagslig atlit vilja verja síni ríki. Og fleiri av teimum sita trygg á trúnuni.

Pøbilin, sum arbeiðir hart fyri at fylla landsins mongu skattkømur, má ofta í neyðuni banka uppá fleiri borgarlið við óloystari sak. Og føroyingurin kennur seg mangan verri staddan enn dólgurin í ævintýrinum. Men ikki allar søgur enda lukkuliga. Lættari var hjá Kloss Hansi at hitta kong og biðja um prinsessuna, enn tað tykist at vera hjá vanligum føroyingum at klíva uppum manngarðar og bera síni hjartamál fyri stjórum og leiðarum kring landið.

Føroyingar sigast vera av kongsætt og hava blátt blóð í æðrunum. Tískil er tað ikki so løgið, at vit hava ein kongstanka um okkara egnu børn og kalla tey fyri prinsar og prinsessur nærum frá fyrsta degi. Vit saðla fegin skjótasta og sterkasta og vakrasta hestin til okkara dýrabæra avkom. Tey skulu fram í lívinum. Øll skulu hava møguleikan. Og allarmest okkara egnu arvingar.



*Ragnar Finnson er ein av teimum, sum hevur víst sítt talent uttanlands*

Talent ella ikki?! Ja, tað er so spurningurin. Jesus, sum vit øll meira ella minni kenna á fornavni, hevur ivaleyst besta boðið uppá ein tíðarleysan sannleika. Talentirnar skulu ikki gravast niður, men koma fram í ljósið. Tað var ein greiður og hjartaligur boðskapur frá einum meistara úr Nasaret. Men neyvan mundi orðini sipað til nakað Talent show, har einans úrmælingarnir yvirliva, og tey hugagóðu og miðalgóðu mangan verða niðurgjørd fyri at vinna hyggjarar og skapa størri undirhaldsvirði. Jú, tíðirnar skifta...

Men prísurin fyri eksponering og viðurkenning er høgur, og spælireglarnar eru líka órættvísar fyri øll. Kapping og happing ella zapping. Soleiðis er sjónvarp í dag.

Meðan tey ungu og gávuríku váða sítt góða skinn fyri at sleppa framat í miðlunum, so royna leiðslur her heima at vinna eitt stríð við so hørðum lúti, at sjálvur biskuppurin noyðist at tala at. Her heima er tað meira slow enn show motion.

Tað hevði hinvegin víst stórsinni og organisatorisk talent, um leiðslan í Kringvarpinum, kanska saman við Rás 2, pallsetti eina frægari undirhaldssending nøkur fylgjandi friggjakvøld ella leygarkvøld, har gávuríkir føroyingar sluppu at vísa sínar talentir. Í nógv ár hava føroyingar stevnt uttanlands fyri at verða sæddir og hoyrdir. Tað nýggja skapandi ættarliðið setir sær nýggj spennandi mál, meðan tey, sum ráða fyri borgum, snara gekkatólinum og spæla V4.

Kanska skuldi vit í Føroyum saman funnið eina alternativa viðgerð, enn hana mong vónrík og gávaði fólk hava upplivað í nærveruni hjá Simon Cowell og Peter Aalbæk Men so mugu vit eisini rudda upp í hugburðinum og hugtakinum, hvat eitt ríkt og gott arbeiðslív er. Tað skal sjálvandi gerast minst líka so spennandi at fara til arbeiðis í Kringvarpinum eitt vikuskiftið, sum at koyra taxa í Havn.

Inntil hugagóð miðlafólk við hóskandi miðlum bjóða hyggjarum kring landið sítt egna føroyska konsept, kunnu vit spæla Talent og gerast eitt sindur klókari og festligari!

## »Tað snýr seg ikki bert um at leggja ár til lívið, men eisini lív í árini!«

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN



Segði ergoterapeuturin Turið Jacobsen so beinrakið, á væleydnaða borgarafundinum í Havn um akutta tørvin á røktaheimsplássum.

Í fyrra lagi var tað ein hvøkkur, at hoyra avvarðandi siga frá, hvussu syndarlig støðan var og í øðrum lagi hugstoytt at fáa “skorið út í papp”, hvussu ófullfíggjarður lógarkarmurin er, tá tað ræður um eitt virðiligt livskvøld hjá teimum, sum bygdu hetta landið.

Víst hava bæði land og kommunur ætlanir á økinum – men færri boð um, hvat vit kunnu gera júst nú. Bústaðarpakkin er ávegis, og stuðulin fyri hvørt búpláss fer ætlandi úr 500 upp í 800 túsund krónur. Og fólk vóru flutt út úr barakkini – men sagt varð, at tey nú vóru á medisinsku deild og onkur á B8! Tó skuldi ein loysn finnast í næstum.

Sólskinssøgan er Sunda Kommuna, sum við Mørkini veruliga hevur kýtt seg at raðfesta búpláss til tey eldru. Verri er í Havn. Orsøkin sigst vera, at landið “eigur” økið. Víst var á, at tann dag kommunan ikki bert fekk vald, men eisini gjald fyri at vara av økinum, fór broytingin at verða sjónlig. Til samanberingar var dagstovnaøkið. Tá hetta varð latið kommununum upp í hendi, hvurvu bíðilistarnir til stovnspláss at kalla. Sum foreldur er tað eisini mín greiða fatan, at barnaansingarm øguleikarnir eru batnaðir munandi, eftir at kommunan hevur fingið økið um hendi. So frymilin, at lata kommununum bæði vald og gjald sum skjótast tykist sólarklárur. Kann bert taka undir við uppskotinum sum landsstýriskvinnan nevndi, um at Havnin verður royndarkommuna. Tað ljóðar sera skilagott eftir mínum tykki.

**Góð hugskot**

Hugskotini um, hvat gerast kundi her og nú komu frá borgarunum og starvsfólkum innan økið, sum luttóku á fundinum. Eitt uppskot var at hækka samsýningina ein fær fyri at hjálpa einum óhjálpnum, ein onnur helt fyri, at tað loysti seg betri, um tey óhjálpnu vóru til umlætting oftari og í styttri tíðarskeið heldur enn sjáldan og í longri tíðarskeið. Hon nevndi sum dømi, at 10 umlættingarpláss, har fólk komu eina viku í senn merkti, at 40 fólk vóru til umlætting í einum 10-vikuskeiði. Trygdartelefon hevði eisini verið ein hjálp.

**Heimasíða ella kapping?**

Luttakararnir høvdu stóra vitan og mong hugskot. Ivaleyst eru enn fleiri hugskot, sum ikki vórðu borin fram á fundinum. Kundi tað verið eitt hugskot við einari heimasíðu har fólk kundu komið við hugskotum um, hvat vit kunnu gera her og nú fyri at bøta um støðuna? Ella kanska ein kapping við hugskotum um, hvussu vit loysa akuttu støðuna. Tí higartil hava vit politikarar ikki megnað at funnið røttu her-og-nú loysnina. Hetta kundi verið íkast til at loysa bráðfeingiskreppuna.

**Nú skal syngjast annað lag**

At eingin loysn er funnin, er skelkandi og fleiri okkara hava ábyrdina. Eg gleði meg til fundin – millum Trivnaðarnevnd Løgtingsins og landsstýriskvinnuna – sum má vera sum skjótast. Tjóðveldi vil gera sítt til, at hetta ikki gerst eitt andstøðu/samgongumál, men eitt mál har vit øll saman taka ábyrgd og loysa bæði akuttu støðuna og fyribyrgja, at hon heldur áfram.

Stóra takk

Takk fyri góða átakið, kunningina, og góðu hugskotini eg fekk við mær!